ítróttur

Nr. 8 • mikudagur • 14. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fram og B68 togast

**Fram skrivaði mánadagin, at teir nú hava gjørt endaliga avtalu við B68 um Hans Fróða Hansen, men enn hevur B68 so ikki váttað handilin**

*Íslendska Fram hevur fyri aðru ferð staðfest, at Hans Fróði Hansen nú kemur til felagð, men á Toftum eru boðini enn, at eingin avtala er gjørd við íslendska felagið*

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Líkt er til, at íslendska fótbóltsfelagið, Fram, framhaldandi roynir at trýsta eina semju við B68 ígjøgnum viðvíkjandi keypinum av Hans Fróða Hansen.

Sum vit skrivaðu í farnu viku, so boðaði Fram tá frá, at teir hava keypt føroyska landsliðsmannin, men sambært B68-formanninum, Niclas Davidsen, so var tó einki í hesum.

Í somu grein varð víst á, hvørjar trupulleikar Fram kundi koma í, um so var, at teir høvdu gjørt avtalu við leikara uttan um felagið, sum hann er sáttmálabundin at, men tað mundi tó vera so sum so við sáttmálanum. Og í øllum førum segði Hans Fróði Hansen seg einki kenna til hendan.

### Eru nærri

Mánadagin seinnapartin skrivaðu teir á heimasíðuni hjá Fram so aftur um handilin. Hesaferð staðfestir felagið, at nú eru øll viðurskiftini við leikaranum komin í rættlag. Sagt verður, at onkur misskiljing var íkomin millum leiðslurnar í Fram og B68, men at hesar nú eru greiddar, og at leikarin nú kemur til Íslands seinast í hesum mánaðinum.

Men tað tykist tó ikki, sum um forkláringstrupulleikin hjá íslendska felagnum er vorðin minni av hesi orsøk. Í øllum førum vilja toftamenn framvegis ikki kennast við handilin, tó at ávís framstig eru hend í so máta hesa seinastu vikuna.

- Vit hava so framvegis ikki skrivað undir nakra avtalu við Fram, men eg kann tó siga somikið, at partarnir eru nærri hvørjum øðrum nú, enn vit vóru fyri eini viku síðani, sigur Niclas Davidsen, formaðurin í B68.

Hvussu nær partarnir eru, vil B68-formaðurin tó ikki siga nakað um, men hvussu er og ikki, so skal hesin parturin av avtaluni upp á pláss, áðrenn nakar handil kann gerast veruleiki.




# Landsliðsleikarar til VB

**Við tilgongd av tveimum litaviskum leikarum, hevur VB fingið hópin til komandi kappingarárið í fótbólti upp á pláss**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kring landið eru fótbóltsvenjingarnar so smátt farnar í gongd aftur, og í flestu feløgunum kring landið hevur aktiviteturin verið nógvur hesar seinastu mánaðirnar. Nógva staðni hevur verið tosað um frágongd av leikarum, og hetta leggur so upp til, at feløgini eisini mugu finna nýggjar mans at seta fyri frágongdina.

### Litaviskur landsliðsleikari

Eisini í Vági hava tey havt úr at gera, og haðani eru boðini, at tey nú halda seg hava hópin til komandi nógvu mánaðirnar kláran.

Av hópinum frá í fjør hevur VB mist nakað av fólki. Predrag Zivkovic, sum í fjør var leikandi venjari, og sum annars hevur leikt við liðnum síðani 2000, verður í ár at síggja í TB, og eisini hevur felagið sagt farvæl við verjuleikaran, Slobodan Madzar, og danska álopsmannin, Brian Andresen, sum tó bara var við liðnum seinnu hálvu av kappingarárinum.

Fyri hesar báðar hevur VB fingið fatur á tveimum litaviskum leikarum, og okkurt bendir á, at hetta eru leikarar, sum væl kunnu vísa seg at gerast góður fongur. Serliga tykist tilgongdin av 22 ára gamla Mindaugas Grigalevic spennandi. Hesin hevur upp gjøgnum ungdómsárini verið fastur fúsur á litavisku ungdómslandsliðunum, og í november fekk hann sín fyrsta skrásetta A-landsdyst, tá Litava leikti venjingardyst móti Pólandi.

Hin leikarin, sum talan er um, er 28 ára gamal og spælir í verjuni, og tó at hann ikki hevur somu altjóða royndir sum landsmaðurin, so hevur hann í nógv ár spælt í bestu litavisku deildini.

Formaðurin í VB, John Hendrik Holm, sigur, at allar avtalur við leikararnar báðar eru komnar í rættlag, men sum hann tekur til, so er helst best ikki at staðfesta nakað, fyrr enn endaligt arbeiðs- og uppihaldsloyvi eisini er komið.

Umframt teir báðar litavarnar, so hevur VB framvegis tveir av útlendsku leikarunum, sum í fjør vóru á liðnum. Danski Anders Sørensen fer aftur í ár at gera um seg á miðvøllinum, og tað sama fer Milan Kulic, sum eftirhondini má sigast at vera gamal kenningur í Vági.

Og so hevur VB eisini fingið fatur á einum leikara úr føroyska landsliðshópinum. Símun Samuelsen royndi seg í fjør hjá GÍ, men nú er studentatilveran á Kambsdali skift út við eina tilsvarandi á Miðnámsdeplinum í Suðuroy, og so verður tað VB, sum komandi árið fer at fáa gleði av fótbóltsevnum hansara.

### Skifta vøllin

Soleiðis er líkt til, at mest sum allur hópurin er komin upp á pláss til komandi kappingarárið, og tá fara vágbingar eisini at spæla á nýggjum undirlendi.

Gjøgnum árini hevur VB fingið mong høgg fyri standin á vøllinum vesturi á Eiðinum, sum fleiri feløg hava sagt vera lívshættisligan, og har tað eisini hevur verið ført fram, at VB hevur fingið órættvísan fyrimun, men serliga hetta seinasta vilja vágbingar sjálvir als ikki kennast við.

John Hendrik Holm sigur eisini, at standurin á vøllinum einamest hevur gingið út yvir VB sjálvar, tí tað eru fyrst og fremst teir, sum hava merkt bágan av hesum, og hann leggur afturat, at tey øll fegnast um, at nýggjur vøllur nú er í ger.

Útskiftingin av undirlendinum hevur tó viðført, at VB í løtuni ikki hevur nakran vøll at venja á. Væntandi verður arbeiðið hesum viðvíkjandi liðugt í apríl mánaði, og fram til tá noyðast vágbingarnir so at venja aðrastaðni, eins og tað helst verður neyðugt at gera onkrar tillagingar í steypakappingini. Antin soleiðis at VB spælir heimadystirnar aðra staðni í oynni, ella soleiðis at kappingin verður lagað, soleiðis at VB spælir allar útidystirnar fyrst.



# Standa dønum mát

**Føroyingar í Keypmannahavn leiktu í vikuskiftinum 4-4 í fremstu donsku deildini. Mótstøðuliðið K 41 vóru undan dystinum á 2. plássi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eftir fjórða umfari sunnudagin, er føroysk telving í donsku elituni helst tryggjað komandi kappingarár. Málið føroyska talvfelagið setti sær undan kappingarbyrjanini, var at halda sær uppi í sterkastu deildini. Og sanniliga hava føroysku útisetarnir prógvað, at teir hoyra heima í donsku superliguni.

Talvfelagið Føroyar hevur skavað sær saman 14,5 stig av 32 møguligum. Dysturin sunnudagin - og fjórða umfar sum heild - gav ábendingar um, at føroyingar neyvan kunnu enda í niðurflytingarvanda.

Vónirnar undan dystinum sunnudagin vóru góðar. Høvuðsmálið var ikki at tapa dystin. Innan tveir tímar var støðan longu 1-1; Norski stórmeistarin á føroyska liðnum, Einar Gausel, leikti ein skjótan og tryggan javnleik við svarta fólkinum móti stórmeistaranum Henrik Danielsen. Eyðun Nolsøe leikti somuleiðis ein skjótan javnleik. Síðani gekk bæði upp og niður næstu 2-3 tímarnar. Kanska høvdu føroyingar møguleikan at vinna tepran sigur, men úrslitið gjørdist tó loksins ein rættvísur 4-4 javnleikur. Ein rættiliga spennandi og víðopin dystur.

Umframt javnleikirnir hjá Gausel og Eyðuni, leiktu Nikolaj Borge og Carl Eli N. Samuelsen javnt, meðan Flóvin Tór Næs og Heini Danielsen hegnisliga vunnu síni talv. John Arni Nilssen og Heini Olsen taptu á hesum sinni.

Støðan eftir 4. umfar er hendan:

| Felag | stig |
|---|---|
| Helsinge | 24,5 |
| Skolerne | 20,0 |
| K41 | 19,0 |
| Sk 1968 | 16,0 |
| Brønshøj | 16,0 |
| Talvf. Fo | 14,5 |
| Nørresundby | 9,5 |
| Århus | 8,5 |

Tvey tey aftastu liðini flyta niður í 2. deild. Trý umfør eru eftir at leika.

Komandi umfar verður 1. februar, tá føroyingar hitta Brønshøj. Í sætta og sjeynda og seinasta umfari (28 — 29. februar) verða mótstøðuliðini ávíkavist Skolerne og Århus.

### Corus Wijk aan Zee av bakkastokki

Leygardagin byrjaði ein tann sterkasta kappingin nakrantíð, tiltikna superstórmeistarakappingin Corus í lítna býnum Wijk aan Zee í Hollandi. Fjúrtan sterkir stórmeistarar - tíverri eingin Kasparov - og eitt miðalrating áljóðandi 2702. Allir skula telva ímóti øllum.

Í fyrsta umfari endaði heili seks talv við javnleiki, og bert í einum talvi varð vinnari funnin. Akopian vann óvæntað leikandi lætt móti einum nipnum Kramnik. Kramnik kom tó sterkt aftur í øðrum umfari, tá hann niðurspældi Loek van Wely.

Anand og Leko eru á odda. Talvið hjá Anand móti Akopian í øðrum umfari er við í blaðnum. Sera javnt er millum teir fjúrtan telvararnar eftir fyrstu tvey umførini.

## Støðan:

| | | |
|---|---|---|
| Anand | (2766) | 1,5 / 2 |
| Leko | (2722) | 1,5 |
| Akopian | (2693) | 1,0 |
| Zhang Zhong | (2639) | 1,0 |
| Bologan | (2679) | 1,0 |
| Shirov | (2736) | 1,0 |
| Adams | (2720) | 1,0 |
| Topalov | (2735) | 1,0 |
| Svidler | (2747) | 1,0 |
| Sokolov | (2706) | 1,0 |
| Bareev | (2714) | 1,0 |
| Kramnik | (2777) | 1,0 |
| Timman | (2578) | 0,5 |
| Van Wely | (2617) | 0,5 |

# Talvið hesa vikuna

Anand,V (2766) - Akopian,V (2693)
GMA Wijk aan Zee NED (2), 11.01.2004

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 a6 6.Be3 Ric6 7.f3 e6 8.g4 (Eingilski varianturin í sisilionsku byrjanini) 8...Be7 9.Fd2 0—0 10.0—0—0 Rixd4 11.Bxd4 b5 12.g5 Rid7 13.h4 Fc7 14.Kb1 b4 (Svartur fer á beina leið í álop. Akopian vann leikandi lætt á sjálvum Kramnik í 1. umfari, og fer eisini eftir einum eins góðum skalpi; Anand) 15.Ria4 Bb7!? (Áhugavert finnuoffur. Men er latna finnan nóg mikið fyri at rista Anand?) 16.Fxb4! (Nei! Anand tekur ímóti offrinum, og velur sostatt at verja seg nakrar leikir, áðrenn hann ætlat at knekka Akopian) 16...Bc6 17.Ric3 Rfb8 18.Fc4 Rie5 19.Fe2 Fa5 20.f4 Rig6 21.Ff3 e5! (Svartur hevur leikt væl síðani hann lat finnuna. Støðan javnvigar nøkunlunda) 22.Bf2 Fb4 23.b3 Rixf4 24.Be1 Fc5 25.Bg3 a5 (Kompromileys álopstelving) 26.Bxf4 exf4 27.Rid5 Bd8 28.Fxf4 a4 29.Rh2 Bxd5 30.exd5 Ba5 31.Fd4 Fa3 32.h5 Bb6 33.Fc3 Ba5 34.Fd4 Bb6 35.Fd3 Re8 36.g6! (Anand fær júst tíð til at vikna um svørtu kongastøðuna) 36...fxg6 37.hxg6 h6 38.Bh3 (hvíti rókurin á h2 stendur avbera væl. Verjir máthóttanir á a-linjuni) 38...Bd8 39.Be6+ Rxe6 (Besti leikur. Kh8 tapir eftir Rxh6+ og mát verður) 40.dxe6 Bf6 41.c3 axb3 42.Fc4 Fa5

DIAGRAM
Støðumynd eftir 42...Fa5



43.e7+! Kh8 44.Re1 Be5 45.Fc6 og svartur gavst. Besta val er bxa2+, men eftir Kc2 er liðugt. Einki gott skák, og e-finnan fer á mál. 1—0

# Landsliðsvenjing

**Fyri aðru ferð í vetur savnaðist ungdómslandsliðið í svimjing á venjingarlegu**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Ungdómslandsliðið í svimjing hevur verið á venjingarlegu í Klaksvík um vikuskiftið .
Tey ið høvdu fingið boð at møta vóru:

Pauli Ø. Mohr — Fuglafjarðar Svimjifelag
Arnold Davidsen — Flot
Remi Langaard — Flot
Joan Símun Edmundsson — Flot
Kári J.À Høvdanum — Skeggjar
Elspa Mørkøre — Skeggjar
Eyðbjørg Petersen — Skeggjar
Heidi Strømsten — Skeggjar
Kirsten Rassmussen — Skeggjar
Gunnleif Olsen — Tvøroyrar Svimjifelag
Jutta Thomsen — Tvøroyrar Svimjifelag
Malan Bærentsen — Tvøroyrar Svimjifelag
Mona Simonsen — Tvøroyrar Svimjifelag
Hildibjørg Joensen — Tvøroyrar Svimjifelag
Maria Vang — Tvøroyrar Svimjifelag
Anna K Eysturberg — Tvøroyrar Svimjifelag
Paula Rasmussen — Havnar Svimjifelag
Brynhild Jacobsen — Havnar Svimjifelag
Bjørg Seloy — Havnar Svimjifelag
Høgni Miné Rasmussen — Havnar Svimjifelag
Petur Mc Intosh — Havnar Svimjifelag



*Ungdómslandsliðið í svimjing hevur júst verið á næstu venjingarleguni*

Hetta er aðru ferð tey eru saman til venjingarlegu í hesum svimjiárinum, tey vera øll við til Stórkappingina sum verður í Havn síðst í hesum mánaðinum.

Annars fara 19 frá ungdómslandsliðnum til Køge at svimjja í mars mánaði, hetta er kapping ið nevnist Køge Open, og koma svimjarar frá Danmark, Svøríki og Føroyum.

Petur Heðin á Fløtti er venjari hjá ungdómslandsliðnum, somuleiðis venur hann A-landsliði sum skal møtast til venjingarlegu í Havn næsta mánað.